# Borgarstjórin gevst

**Borgarstjórin í Vestmanna seinnu árini, Gunn Joensen, gevst í kommunalpolitikki, tá hetta skeiðið er úti á nýgjárinum**

KOMMUNALPOLITIKKUR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Ein av profilunum á kenda kvinulistanum í Vestmanna gevst eftir næsta kommuval. Tað er sjálvur borgarstjórin, sum ikki stillar uppaftur.

Gunn Joensen, borgarstjóri, sigur, at hon eftir 12 á í kommunalpolitikki hevur gjørt av ikki at stilla upp aftur til komandi kommunuval, sum verður í heyst.

Í Vestmanna tóku kvinnurnar valdið, so at siga, í nítiárunum, tá tær gjørdu sín egna lista og fingu mestsum einaræði í bygdarráðnum. Síðan hava tær stýrt bygdini við fyrst Mariu Hansen og síðan Gunn Joensen sum borgarstjórum.

Um tað er beinleiðis grundin til betraðu fíggjarstøðuna í Vestmanna, vil Gunn Joensen ikki siga, men skuldin er minkað munandi hesi árini, síðan kvinnurnar tóku við, sigur hon.

Kortini eru mál, sum eru loyst hesi árini. Eisini slík, sum kosta pengar, sigur fráfarandi borgarstjórin.

Nýggja barnagarðin, sum varð reistur hendan dagin, er hon sera fegin um. Eisini er vatntrupulleikin hjá Vestmanna Kommunu loystur hesi árini, sigur hon. Vestmanna hevur nú vatngoymslur til bygdina, so vatntrot skuldi ikki komið fyri aftur.

Tað var eitt paradoks, at bygdin við størstu vatngoymslum í landinum, tær hjá SEV, ikki hevði atgongd til nokk av drekkivatni. Men tað var alingin á vøtnunum, sum gjørdi tað sigur Gunn Joensen.

Í aðrar mátar er kommunan væl fyri, sigur hon. Vegir og bygningar hjá kommununi eru í góðum standi.



*Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, stillar ikki upp aftur til kommunuvalið eftir at hava sitið í bygdarráðnum í 12 ár*

# Nýtt kollegii í Vestmanna

**Ein áheitan frá leiðsluni á Fiskivinnuskúlanum á vestmenningar um at fáa til vega bústaðir til næmingar skúlans, sæst nú aftur á Fitjunum. Eitt nýtt kollegii verður klárt í summar**

BÚSTAÐIR
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Nýtt bústaðartilboð verður til næmingarnar á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna, tá skúlaárið byrjar aftur eftir summarfrítíðina. Tað eru brøðurnir Jónfinn, Ivan og Hákun Egilsnes í Vestmanna, sum hava tikið stig til at byggja kollegii í Vestmanna.

Inni á Fitjum í Vestmanna arbeiða menn við at innrætta ovaru hædd á einum stórum neysti til bústaðir. Talan er um at gera 6 kømur við tilhoyrandi køki og uppihaldsrúmi, sum skulu hýsa næmingum, ið ganga á Fiskivinnuskúlanum í Vestmanna. Um summarið verða kømuruni leigað út til ferðafólk.

Jónfinn Egilsnes sigur, at hugskotið til hetta tiltakið kom, tá leiðslan á Fiskivinnuskúlanum herfyri sendi eitt skriv út til vestmenningar, har heitt varð á fólk um at hjálpa til at hýsa teimum fremmandu næmingunum, sum komu á skúlan.

Teir hava síðan innrættað ovaru hæddina á neystinum, sum væntandi fer at standa liðug umleið hálvan juni.

Í teimum seks kømurunum, sum vera í húsinum, verður tað, sum ein næmingabústaður í dag hevur brúk fyri. Har verður song, borð stólur og skáp, umframt sjónvarp og linjur til telefon og internet.

Leigukostnaðurin veðru kr. 1.700,- um mánan, sigur Jónfinn Egilsnes. Tá er internethald íroknað, sigur hann.

Talan er um eitt neyst við innrættaðum lofti, og niðara hæddin verður framvegis neyst.

Har fara teir at innrætta eina lítla smiðju, greiðir Jónfinn Egilnes frá. Teir ætla so at bjóða fólki møguleika fyri at taka smærri bátar upp og umvæla teir inni, sigur hann. Staðið liggur væl fyri inni í bátahylinum beint uttan fyri Fossá.

Gamla staðarnavnið her nýggju næmingabústaðirnir eru, er Krákureiðrið, greiðir Jónfinn Egilsnes frá. Og tað navnið hava teir givið bygninginum. So fiskivinnunæmingar í Vestmanna fara í framtíðini at búgva í einum krákureiðri. Og kømurini fara so eisini at fáa navn efir kráku, sigur hann. So sum krákunev, krákubein og kanska krákuvongur.



*Nýggju næmingabústaðirnir liggja rættiliga væl fyri beint yvir bátahylinum í Vestmanna. Hugnaliga umhvørvið er eisini sera vælegnað at bjóða ferðafólki, sum ætlanin er at hava búgvandi um summarið, meðan Fiskivinnuskúlin hevur frí*

*Mynd: Edvard Joensen*

# Nýggjur barnagarður í Vestmanna

**Nýggjur barnagaðrur varð reistur í Vestmanna hósdagin. Pláss er fyri 84 børnum í nýggja stovninum, sum fer at kosta umleið átta milliónir krónur**

BARNAANSING
*Edvard Joensen*

**Vestmanna:**
Í Vestmanna fáa tey nýggjan dagstovn. Hann varð reistur hósdagin og fer at hýsa reiðiliga 80 børnum.

Tað flaggar í Miðalsbrekku í Vestmanna, uttanvert Gjógvará, verður ein rættiliga stórur bygningur reistur. Í grundini er talan um fleri bygningar, sum eru knýttir saman av eini miðhøll. Hetta er nýggi dagstovunurin í Vestmanna, sum Vestmanna Timburhandil hevur latið til Vestmanna Kommunu.

Bygningurin er 722 fermetrar til víddar, greiðir Gunn Joensen, borgarstjóri í Vestmanna, frá. Hann fer at kosta umleið átta milliónir krónur, tá hann er liðugur, sigur hon. Talan er um eina lidna loysn, sum keypt er frá Vestmanna Timburhandli.

Nýggi barnagarðurin fer at hýsa 84 børnum, sum fáa rættiliga gott pláss í hesum stóra stovninum. Fimm stovur verða á stovninum umframt felagsrúm, sigur borgarstjórin.

Umframt nýggja barnagarðin er ansingarskipan til 35 børn í Vestmanna. Talan er um útibarnagarð og um frítíðaransing, sum framhaldandi fara at vera, hóast nýggi stovnurin nú verður bygdur.

Gunn Joensen sigur, at tá hesin nýggi barnagarðurin byrjar, verður eingin bíðilisti til barnaaning í Vestmanna.

Sum so nógv annað í Vestmanna liggur nýggi barnagarðurin mest at kalla í brattlendi. Landslagið er soleiðis háttað í bygdini, sigur borgarstjórin. So tann stóri møguleikin er ikki fyri at gera stórt pláss uttan fyri. Tó eigur kommunan eisini stykkið niðan fyri barnagarðin, og har er møguleiki fyri at gera spælipláss í framtíðini, sigur Gunn Joensen.

Tað órógvar ikki borgarstjóran, at næsti grannin er Gjógvará, sum er rættiliga brøtt og djúp.

– Har verður hegnað væl, sigur hon, og heldur ikki, at nakað er at óttast fyri í so máta.



*Nýggi dagstovnurin í Vestmanna varð reistur hósdagin. Hann fer at hýsa 84 børnum*

*Mynd: Edvard Joensen*



*Nýggi dagstovnurin liggur uppi í Miðalsbrekku við Gjógvará sum næsta granna*

*Mynd. Edvard Joensen*



# Klagan kemur ikki óvart á meg

**Annlis Bjarkhamar heldur framvegis ikki, at hon gjørdi skeivt, tá ið hon setti Steffen Stumman Hansen í starvið, sum landsfornfrøðing, hóast næstan øll starvsfólkini nú hava klagað hann**

LANDSFORNFRØÐINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Útfrá teimum upplýsingum eg hevði, varð Steffen Stumman Hansen rætti maðurin at seta í starvið sum landsfornfrøðingur.

Tað heldur Annlis Bjarkhamar framvegis,

Tað var hon, sum var landsstýriskvinna í mentamálum, tá ið Steffen Stumman Hansen varð settur í starv sum landsfornfrøðingur fyri einum ári síðani.

Og tað var sostatt eisini hon, sum setti hann í starvið.

Men starvssetanin varð so umstrídd, at tað kostaði henni høvdið sum landsstýriskvinna.

Nú ósemjurnar ímillum starvsfólkið á fornminnissavninum og leiðara teirra, Steffen Stumman Hansen, Landsfornfrøðing, nú standa í ljósum loga, hava vit biðið Annlis Bjarkhamar kaga í bakspegilin.

Og tí spurdu vit hana, um hon framvegis er sannførd um, at hetta var rætti maðurin til starvið.

– Eg kann bara siga, at útfrá teimum upplýsingum, sum hon hevði tá, var hetta rætti maðurin til starvið.

Hon vísir eisini á, at Løgtingsins umboðsmaður viðgjørdi málið og kom ikki til ta niðurstøðu, at hon hevði gjørt nakað skeivt.

– Og fyri mítt viðkomandi endaði málið, tá ið niðurstøðan hjá løgtingsins umboðsmanni kom.



*Ein stórur spurningur er, um starvsfólkið á Fornminnissavninum hevur givið Steffen Stumman Hansen ein veruligan møguleika at virka sum leiðari, heldur Annlis Bjarkhamar, sum setti hann í starvið*

### Ikki broytt meining enn

Annlis Bjarkhamar sigur, at hóast alt tað, sum nú er komið fram um ósemjur á hesum almenna stovninum, er hon enn ikki sannførd um, at hon valdi skeivt.

Hon kennir ikki smálutirnar í klaguni frá starvsfólkunum um Landsfornfrøðingin.

Men tað kemur ikki óvart á hana, at starvsfólkini gera vart við seg.

– Tað er ongin loyna, at tey vildu ikki hava Steffen Stumman Hansen í starvið og tí kemur tað als ikki óvart á meg, at tey gera vart við seg, sigur hon.

Men tá ið tú sigur, at so nógv fólk vóru ímóti Steffen Stumman Hansen frá fyrstan tíð, heldur tú at hann so er blivin offur fyri gomlum fordómum og at starvsfólkið í veruleikanum ongantíð hevur givið honum møguleikan at royna seg?

– Tað veit eg ikki, tí eg kenni ikki málið. Men eg haldi, at maðurin hevði í øllum førum uppiborið at fáa ein veruligan møguleika. Tað er sjálvsagt ein spurningur, hvussu arbeiðsumstøðurnar hjá honum hava verið.

– Tað eru altíð tveir partar í einum slíkum máli og eru báðir partar ikki frá fyrsta degi av, sinnaðir til at fáa tað besta burturúr, er tað greitt, at tað skapar trupulleikar. – Er mótvilji ímóti leiðaranum, hevur hann ongan møguleika at virka.

Hon leggur kortini dent á, at vit hesum hevur hon ikki sagt, at annar parturin á Fornminnissavninum hevur ikki víst samstarvsvilja, tí hon kennir ikki smálutirnar í málinum.

Men hon heldur, at tað er áhugavert at fáa greiði á, um hann hevur havt ein veruligan møguleika.

Tá ið tú visti, at so nógv starvsfólk vóru ímóti at Steffen Stumman varð settur, var tað so ikki skilabetri at seta hin umsøkjaran fyri at tryggja arbeiðsfriðin á stovninum?

– Hví ta? Var tað ikki umráðandi at tann best skikkaði umsøkjarin varð settur, spyr hon afturímóti.

Hvat starvsfólkini hildu, hevur onki við málið at gera. Vit kunnu ikki hugsa um taktikk, tá ið starvsfólk verða sett, tí hvar enda vit so? Tað stóð heldur onki um tað í starvslýsingini, at leiðarin skuldi verða góðtikin av starvsfólkinum á Fornminnissavninum.

– Og eg haldi eisini, at starvsfólkið eigur at góðtaka tann leiðaran, sum varð settur, tí tað eru ikki starvsfólkið, sum setir leiðaran. Tað eru ikki starvsfólkini, sum velja sín egna leiðara, men tey eiga at góðtaka tann leiðara, tey fáa og at geva honum ein møguleika at útinna sítt starv.

Hon endurtekur, at tað einasta, hon hevði at halda seg til, vóru teir báðir umsøkjararnir, sum vóru.

Hvat Starvsfólkini hildu, var ikki partur í málinum.

– Men nú er nýggjur landsstýrismaður settur í starvinum og tað kann vera, at starvsfólkið roynir eydnuna hjá honum, sigur hon.

Hon vil ikki útgreina tað nærri, men hon ivast ikki í, at landsstýrismaðurin tekur ta rættu støðuna og at lýsa málið frá báðum síðum.

Hon heldur eisini, at tá ið so nógv starvsfólk á einum stovni gera vart við sína ónøgd, eigur landsstýrismaðurin avgjørt at lurta eftir teimum. Men hann eigur eisini at lurta eftir Landsfornfrøðinginum, sigur Annlis Bjarkhamar.

# Hevur øst starvsfólkið upp

**Landsfornfrøðingurin sigur, at Arne Thorsteinsson øsir starvsfólkið á Fornminnissavninum upp, men starvsfólkið sigur, at landsfornfrøðingurin kann ikki brúkast**

LANDSFORNFRØÐINGUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Føroya Fornminnissavn er ein stovnur í svárari kreppu.

Tað má ásannast eftir tað, sum er farið fram seinastu dagarnar.

At tað prutlar undir lokinum á Fornminnissavninum, er onki nýtt.

Tað kom av álvara røringur í á Fornminnissavninum, tá ið Steffen Stumman Hansen varð settur í starvið sum landsfornfrøðingur fyri einum ári síðani.

Hetta varð ein avgerð, sum vakti stóran ans, tí starvsfólkið á Fornminnissavninum vildi heldur hava, at Símun Arge skuldi fáa starvið. Nevndin, sum innstillaði til starvið helt eisini, a Símum Arge varð best skikkaður.

Men kortini setti Annlis Bjarkhamar, sum varð landsstýriskvinna, Steffen Stumman Hansen í starvið, tí hon helt, at hann var best skikkaður.

Men nú eitt ár er farið, er støðan á Fornminnissavninum verri enn nakrantíð.



Tað endaði við, at 13 av teimum 15 starvsfólkunum á savninum herfyri klagaðu landsfornfrøðingini fyri landsstýrismanninum í mentamálum.

Ongin fæst at siga nakað um klaguna, men niðurstøðan er, at Steffen Stumman Hansen er ikki egnaður at vera leiðari á Fornminnissavninum.

Samstundis hava tey biðið landsstýrismannin í mentamálum um fund um viðurskiftini á stovninum.

Steffen Stumman Hansen hevur svarað aftur við at klaga gamla landsfornfrøðingin, Arna Thorsteinsson fyri landsstýrismanninum.

### Ótolandi

Steffen Stumman Hansen vil ikki siga nakað um klaguna, ella um innanhýsis viðurskifti á fornminnissavninum annars.

Arne Thorsteinsson vil heldur ikki siga nakað um viðurskiftini. Hann vil heldur ikki siga nakað um klaguna.

– Klagan er heldur ógreið, men niðurstøðan í henni er, at eg skal hava øst starvsfólkið á Fornminnissavninum upp ímóti leiðararnum, sigur hann.

Hann vil ikki gera fleiri viðmerkingar til tað, men hann sigur kortini, at tað kennir hann onki til.

Hinvegin siga onnur starvsfólk á Fornminnissavninum, at tað er óneyðugt hjá nøkrum at øsa starvsfólkið upp.

– Tað nýtist landsfornfrøðinginum als ikki at hava hjálp til, tí tað klárar hann ógvuliga væl sjálvur, siga tey.

Tey siga eisini, at arbeiðsviðurskiftini á Fornminnissavninum eru ótolandi, sum støðan nú er. Og tey stúra fyri, at stovnurin rættiliga er í ferð við at syndrast.

Vit spurdu eisini Steffen Stumman Hansen um, hvussu tað ber til, at viðurskiftini eru so vánalig. Men tað vil hann ikki siga nakað um.

– Men tað er ongin loyna, at starvsfólkið heldur vildi hava ein annan leiðara. Hevur tú merkt nakað til mótvilja frá starvsfólkunum, so at tú í veruleikanum ikki hevur havt nakran møguleika at virka sum leiðari.

– Lat meg siga tað soleiðis: Tað hevur verið ómetaliga trupult, sigur Steffen Stumman Hansen.

Meiri vil hann ikki útgreina viðurskiftini.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í mentamálum sigur, at málið verður nú viðgjørt eftir teirri føstu mannagongd, sum eru fyri starvsfólkamál av slíkum slagi.

Tað merkir, at málið verður nú viðgjørt á embætismannastigi og sjálvur er hann ikki komin upp í málið enn.